Fiskidagarnar lækka 2%

Hóast harða mótstøðu, so fekk meirilutin í vinnunevndini sín vilja í løgtinginum hósdagin. Komandi fiskiár veður fiskidagatalið lækkað við 784 døgum

FISKIDAGATAL
Páll Holm Johannesen

Løgtingið samtykti hósdagin at skerja fiskidagatalið komandi fiskidagaár við tveimum prosentum. 16 atkvøddu fyri uppskotunum hjá meirilutanum í vinnunevndini, meðan 12 atkvøddu ímóti. Hetta hevur við sær, at í alt 784 dagar verða strikaðar frá 1. september, tá fiskiárið byrjar.

Hørð mótstøða

Í tinginum var hørð mótstøða ímóti uppskotunum hjá meirilutanum í vinnunevndini. Tilmælini frá føroysku fiskivinnufrøðingunum um at minka um veiðitrýstið við 25% yvir komandi trý árini, varð mett av fleiri tinglimum ikki at verða haldabart. Fleiri tingmenn saknaðu eisini haldgóð prógv frá meirilutanum í vinnunevndini fyri at skerja fiskidagatalið.

Tað varð víst á, at fiskifrøðingurin so at siga aldrin koma við røttum tilmælum, og tískil áttu vit ikki at fylgt teimum. Jørgen Niclasen greiddi frá, at um vit fylgdu tilmælunum í fjør frá fiskifrøðingunum, so hevði føroyska samfelagið verði 600 milliónir fátækari.

Tilmælini hjá íslendska fiskifrøðingum, Jón Kjartansson, um at varðveita sama veiðurtrýst, vórðu eisini havd á lofti. Fleiri tingmenn hildu íslendingin hava greiðu í sínum máli, og tí varð heitt á løgtingsmenn um at atkvøða ímóti uppskotunum hjá meirilutanum í vinnunevndini.

Tað varð eisini nevnt, at heili 20 % av tillutaðu fiskidøgunum ikki vóru nýttir, og tískil kom skerjingin av fiskidøgum serliga at raka teir, ið veruliga royndu, og nýttu sínar tillutaðu dagar.

Tað er ikki løgið, um tingmenn hósdagin kendi seg heldur ørkymlaðar. Heili seks tilmælið vóru at taka støðu til. Ices, Fiskidaganevndin, Landsstýri, Fiskivinnuumsitingin, føroysku fiskifrøðingarnir og meirilutin í Vinnunevndini høvdu hvør sítt tilmæli. Kortini harða mótstøðu úr serliga Fólkaflokstingmonnum, so varð uppskotið hjá meirilutanum í Vinnunevndini endaliga samtykt.

Fiskidagatalið lækkað 9,5 %

Fiskidagatalið 1996-2004

1996-1997:	43585	dagar
1997-1998:	43389	–
1998-1999:	41219	–
1999-2000:	41219	–
2000-2001:	41219	–
2001-2002:	40671	–
2002-2003:	40265	–
2003-2004:	39460	–

Fiskiárið er frá 1.september í inniverandi ári til 31.august árið eftir. Fiskidagatalið fyri 1996 til 1997 er galdandi í fimtan mánaðar, tí talið er frá 1.juni, og ikki 1. september. Av fiskidagatølunum frá 1996/1997 til 2003/2004 gongur fram, at fiskidagatalið í alt er lækkað við 9,5%

†

Kunngjørt verður ætt og vinum, at kæra kona, mamma, omma, dóttir, systir og verdóttir okkara

GUNNVÁ REYNHEIM OLSEN
Hoyvík

andaðist heima, hósdagin 7. august 2003, 37 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Dómkirkjuni sunnudagin kl. 14.00.

Familjunnar vegna
Gunnar,
Marita, Johanna, Johannes og Elisabeth

Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu tá okkara kæra

Elisa Hammer
Haldarsvík

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til starvsfólkið á B6 og E3.
Tøkk til Hera Joensen, prest, í kapellinum og Martin Restorff, prest, í kirkjuni.
Tøkk til sangarar, berarar, Avhaldshúsið, tykkum, sum stóðu fyri og á annan hátt hjálptu til við jarðarferðini.
Tøkk fyri kransar, blómur, peningagávu til Haldórsvíkar kirkju og tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Tey avvarðandi

Formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna um skerjingina:

– Okkum vanta haldgóð prógv

Æðunn Koráðsson er alt annað enn fegin um løgtingssamtyktina um at skerja fiskidagatalið við tveimum prosentum. Honum vantar haldgóð prógv, og sigur, at um politikkar-ar-nir framhaldandi halda á við at skerja fiskidagatalið á hvørjum ári, so verður grund-arlagið tikið undan vinnuni

FISKIDAGATAL
Páll Holm Johannesen

Í løgtinginum hósdagin vístu fleiri løgtingslimir á, at ein skerjing í fiskidagatalinum fór serliga at raka útróðrarflotan meint. Útróðrarmenn í bólki 4 hava sum er eitt lágt fiskidagatal, og við løgtingssamtyktini, verður enn meir máa av teirra fiskidøgum. Formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna er alt annað enn fegin um skerjingina.

– Eg kann als ikki siga, eg eri glaður um minkingina í fiskidagatalinum, og eg má framvegis vísa á, at mær vantar argument fyri minkingini, sigur Æyðunn Konráðsson.

Tilmælini fara skeiv

Formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna skilir ikki, hvussu tað ber til at taka tilmælini hjá Ices og føroysku fiskifrøðingunum fyri fult.

– Tær eru farnir so ofta skeivir, at ein kann ikki áhaldandi trúgva teimum. Okkurt árið hava vit fiska 150 % meir enn vit áttu, og kortini vaks stovnurin, greiðir Æðunn Konráðsson frá.

Fiskidagaskipanin tillagar seg sjálv

Æðunn Konráðsson fýlist eisini á, at politikkarnar á hvørjum ári blanda seg í fiskidagaskipanina. Hann vísir á, at føroyska fiskidagaskipanin er bygd upp eftir tí leisti, at hon skal tillaga seg sjálv.

–Skipanin er soleiðis, at um nógvur fiskur er, so fiska vit nógv, meðan er lítið til, so fáa tilsvarandi lítið, so hon regulerar seg sjálv. Eg skilji tí ikki, hví politikkararnir á hvørjum ári, skulu leggja seg út í skipanina og regulera hana sjálvir, fortelur formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna.

Grundarlagið tikið undan

Hetta er á øðrum ári, at løgtingið samtykkir at skerja fiskidagatalið. Í fjør varð minkað við einum prosenti, og verður hugt samlað, síðan fiskidagaskipanin kom í gildi í 1996, so er fiskidagatalið í alt minkað við góðum 18 prosentum. Formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna heldur lítið um gongdina.

– Halda politikkarnar fram við at skerja fiskidagatalið, so taka teir grundarlagið undan vinnuni, sigur Æðunn Konráðsson at enda.

Eg kann als ikki siga, eg eri glaður um minkingina í fiskidagatalinum, og eg má framvegis vísa á, at mær vantar argument fyri minkingini, sigur Æyðunn Konráðsson.

Jens Guð, tónleikafjeppari og føroyavinur, og Rakul Guðjónsson avmyndað í sambandi við eina føroyaferð hjá Jens Guð. Jens Guð sigur at enn hevur føroyska bylgjan í Íslandi als ikki lagt seg

Ísland:

Føroyska bylgjan ikki lagt seg

Íslendingar eru enn hugtiknir av tí, ið føroyskt er innan listaheimin, serliga tónleikin, og sonevnda føroyska bylgjan, ið av álvara reistist á vári í 2002, hevur ikki lagt seg enn

TÓNLEIKUR
Dagfinn Olsen

Á vári í 2002, á leið í apríl, byrjaði av álvara sonevnd føroysk bylgja í Íslandi. Byrjanin var flogan hjá Týr, har Ormurin Langi rættiliga gjørdi um seg í Íslandi og enn er hon gerandiskostur í íslendskum útvørpum og í sjónvarpi.

Heimildarmaður okkara í Íslandi, Jens Guð, ið fylgir væl við á tónleikaøkinum og eisini hevur tokka til føroyskan tónleik, sigur at Týr í Íslandi hava selt eini 3000 eintøk av fyrstu fløguni. Hann umboðar føroyskar flogur í Íslandi og til Føroysku Dagarnar í Ólafsvík herfyri seldi hann eina rúgvu av føroyskum tónleiki, yvir 100 fløgur við nøvnum sum Týr, Eivör, Clickhaze, Harkaliðið, Impulz, Springs, Hanus, Enekk og mongum øðrum.

Jens metir, at føroyskir tónleikarar eiga at hava hetta í huga. Íslendingar hava ikki hug at hoyra føroyingar syngja á enskum, men vilja hoyra føroyskan tónleik á føroyskum máli.

Íslendsk bløð høvdu eisini á máli til Prix Føroyar finaluna, at heldur nógv var á enskum og mettu bløðini, at eisini aðrir útlendingar leita eftir føroyskum tónleiki á føroyskum. Sum dømi tekur Jens íslendska bólkin Sigur Rós, sum íslendingar eru stoltir av. Bólkurin hevur íslendskt navn og syngur á íslendskum, men hevur um heimin selt yvir eina milión eintøk av hvørjari av tveimum teirra síðstu fløgum.Í USA komu teir høgt á hittlistan og merkir hetta, at Sigur Rós har er størri enn Bjørk.

Bjørk syngur annars ongantíð á enskum, tá hon framførur í Íslandi, sigur Jens. Hon yrkir eisini sínar sangir á íslendskum og umsetur so til enskt mál, tí tað er so nógv hon hevur hug at siga útlendingum um norðurlendska guðalæru og annað.

Nýggja fløgan hjá Týr er eisini væl móttikin í Íslandi og Ras 2 hevur fløguna sum Album of the week. Tað merkir, at nógv verður spælt og spurnarkappingar og burturlutingar eru í samband við útgávuna.Bløðini skriva eisini dúgliga um fløguna og hevur hon í einum blað fingið 4 stjørnur av 5 møguligum.

At bylgjan ikki hevur lagt seg sæst í íslendskum bløðum og tónleikabløðum. T.d. er juli útgávan av Sánd merkt av føroyskum tónleiki, Um G! festival, nógv um Týr og Eivør Pálsdóttir.

Eivør er stórt navn í Íslandi og hevur prýtt forsíðurnar á øllum bløðunum. Íslendingar bíða nú spentir eftir nýggju fløguni, har íslendskir tónleikarar leika við. Jú, enn slær føroyska bylgjan framvið klettum Íslands, staðfestir Jens Guð, tónleikafjeppari og Føroyavinur.